## DAGSINS MEINING

# Maktstríð og tapt fullveldi

Tað brast ikki í Tinganesi – hesaferð. Í evstu løtu gjørdi Høgni Hoydal av at eftirlíka kravinum frá løgmanni um at taka aftur uppskotini, hann bar niðan í tingið, meðan løgmaður var uttanlands.

Men einki bendir á, at semja kortini er millum flokkrnar – og eftir situr veljarin og veit hvørki út ella inn. Høgni Hoydal misti andlit, tá hann ikki megnaði at standa móti trýstinum frá løgmanni, sum eisini hevur mist andlit, tí hann ikki megnaði at fáa Høgna Hoydal at taka aftur uppskotini fyri tingfundin. Stutt kann sigast, at samgongan hevur mist trúvirðið – og kann við tað sama bara siga sum er, at fullveldismálið er dottið á gólvið.

Vit hava fyrr víst á, at Tjóðveldisflokkurin av røttum kann vera vónsvikin av Fólkaflokkinum í fullveldismálinum. Men vit kunnu leggja afturat, at hetta kanska er lagnunnar speisemi, tí Tjóðveldisflokkurin hevði allar møguleikar eftir valið í 1998, men valdi heldur at kasta seg í føvningin á Fólkaflokkinum. Úrslitið er, at Fólkaflokkurin hevur fingið allan sín politikk ígjøgnum, meðan Tjóðveldisflokkurin ongan veg er komin við sínum einasta máli, fullveldismálinum.

Tað er framvegis tann breiða semjan, sum er trupulleikin. Løgmaður hevur tosað um hesa breiðu semju, men hetta tykist bara vera orð. Tjóðveldisflokkurin vil ikki hava eina breiða semju, tí so verður einki fullveldi í hesi syftu. Men Tjóðveldisflokkurin valdi at seta Javnaðarflokkin uttanfyri í 1998. Til valið tá vara tað bara Sambandsflokkurin sum isoleraði seg við afturhaldspolitikkinum. Hann hevur nú kortini førkað seg, men nú tykist, at tað er Tjóðveldisflokkurin, sum isolerar seg við víðgongda politikkinum.

Á fólkafundi á Vaglinum leygardagin, royndi partur av Tjóðveldisflokkinum at leggja sjógv millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin. Millum víðgongdu røðararnar var eisini mentamálaráðharrin, sum ýldi um vápnaðan uppreistur, um herdeildir í Mjørkadali og herskip í Nólsoyarfirði, sum lógu tilbúgvin, um Høgni Hoydal vann móti løgmanni, og um danskar leigusveinar í Føroyum.

Hvussu leikur fer, fara komandi dagarnir at vísa. Víðgongdastu nationalistarnir hava tapt, og fullveldismálið er farið fyri bakka. Spurningurin er so, um landsstýrið kann finna eina breiðari semju, sum flytur Føroyar longur fram á sjálvbjargnisleið, ella um Tjóðveldisflokkurin bara fer at tvíhalda um maktina – fyri at einki skal koma burturúr…

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

**Til minnis um Conrad Joensen**
*f. 3. august 1907*
*d. 28. februar 2001*



Seinasta mikudag andaðist Conrad Joensen á Láargarði 93 ára gamal.

Conrad varð føddur í Havn í 1907, sonur Johannes Joensen og Mariu, fødd Nicolaisen. Familjan búði eina tíð í Klaksvík. Liðugur við barnaskúlan fór hann til skips og seinni á motorpassaraskúla.

Eftir hetta sigldi hann eina tíð, til hann fór til Danmarkar á keypmannaskúla. Komin aftur fekk hann í 1931 arbeiði sum bókhaldari hjá H. N. Jacobsens Bókahandli í Havn.

Í 1934 fór hann í starv hjá Chr. Holm Jacobsen, ið millum annað hevði umboð fyri oljufelagið Shell í Føroyum.

Conrad varð verðandi hjá Chr. Holm Jacobsen, til hann í 1954 tók av tilboðnum um at verða stjóri hjá Shell í Føroyum. Hann røkti hetta starv til 1969, tá hann fer frá fyri aldur, 62 ára gamal. Eftir tað fer hann at arbeiða hjá Marr & Co., og varð har, til hann legði endaliga frá sær umleið 85 ára gamal, eftir ein óvanliga langan arbeiðsdag.

Conrad giftist við Helenu, fødd Isaksen, ættað av Viðareiði, dóttir Sáru og Jens Klæmint Isaksen, sum seinni búsettust í Klaksvík.

Helena og Conrad bygdu hús við Dalavegin í Havn, og børn teirra eru: Eyðun, Árni, Ragnar, Marjun og Sára. Umframt sítt dagliga arbeiði var Conrad sera virkin inn brøðrasamkomuna.

Eitt av hansara hjartamálum var at geva landsmonnum sínum Orð Guds á egnum máli, og var hann við í nevndini í Hinum Føroyska Bíbliugrunninum, ið gav Bíbliuna út á føroyskum máli í 1949. Umframt at vera í nevndini í Bíbliugrunninum í úti við hálva øld, hevði hann eisini roknskapin hjá Ebenezer í mong ár.

Sum uppvaksin á Dalavegnum, har tey trý systkinini Conrad, Sigird og Jóna hava verið ein partur av gerandisdegnum, má sigast, at tey, við sínum fyrikomandi, trúfasta og Gudsóttandi lyndi, hava havt góða ávirkan á grannalagið. Friður Guds verði við minninum um Conrad Joensen.

**Magnus**

# Nógv fólk at aðalfundi

**Leygardagin hevði Starvsmannafelagið sín 40. aðalfund**

TÍÐINDASKRIV
*Starvsmannafelagið*

Starvsmannafelagið hevði ársaðalfund leygardagin 3. mars í Havnar Klubba.

Hetta var 40. aðalfundur felagsins. Umleið 1700 limir eru nú í Starvsmannafelagnum.

Rættuliga nógv fólk var á fundi, og vórðu vanlig felagsmál til viðgerðar.

Nevndarval var eisini á skránni og stóðu John Kjær og Marin Katrina Frýdal fyri vali. Marin Katrina bar seg undan afturvali, og í hennara stað varð Selma Ellingsgaard val, meðan John Kjær varð afturvaldur.

Hinir nevndarlimirnir eru: Gunnleivur Dalsgarð, formaður, Heini Joensen og Ingun Olsen.

Tiltakslimirnir eru Suni Selfoss (afturvaldur) og Gunnvá Hansen (nývald).

Efirlønargrunnur Starvsmannafelagsins hevði aðalfund beint aftaná, og varð sitandi nevnd: John Kjær, Jákup Danielsen og Gunnleivur Dalsgarð afturvald.

Grunnurin er væl fyri og samtykt varð at fara undir at útbyggja tryggingarskipanina við trygging í sambandi við hættisligar sjúkur, sigur Starvsmannafelagið.



*Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum og Ingun Olsen, nevndarlimur á móttøku hjá Starvsmannafelagnum á 40 ára degnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



